**LÓG**

**GØTU FORNMINNISSAVN**

Sett á stovn av Gøtu Fornminnisfelag 6. august 1995

$ 1 Navn savnsins er Gøtu Fornminnissavn

$ 2 Endamál savnsins er innan Gøtu kommunu

at varveita fornminni, hús, kirkju og fornlutir og at savna upplýsingar, myndir og annað av bygdasøguligum týdningi bæði úr fortíð og nútíð og at vekja ans fyri hesum.

at útbyggja verðandi framsýningar og seta savnvørð við savnið, sum við stuðli frá Gøtu Fornminnisfelag kann halda fram og føra tað verk víðari, sum felagið byrjaði.

$ 3 Gøtu Fornminnissavn verður stýrt av eini 3-mannanevnd, soleiðis at Gøtu Fornminnisfelag velur tveir limir og Gøtu Bygdaráð ein. Stýri skipar seg sjálvt. Stýri stendur aðalfundi Gøtu Fornminnisfelag (og Gøtu kommunu) til svars fyri ognum og rakstri savnsins.

$ 4 Nevndin skal fáa savni góðkent hjá Føroya Landsstýri sum "stuðulssøkjand bygdasavn" og reka savni sambært løgtingslóg nr 17 frá 9. mai 1972 við seinri broytingum, um bygdasøvn við menturnarsøguligum virksemi.

$ 5 Rakstraræltlan verður løgd fyri landsantikvarin til góðkenningar. Roknskaparári er álmunakkaárið. Grannskoðaður roknskapur verður saman við frágreiðing frá farna árinum latin landsantikvarinum at góðkenna.

$ 6 Gevst savnið við virki sínum, verður fari fram eftir grein 3, 3.stk í løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972, við seinri broytingum.

$ 6 Hesar viðtøkur fáa gildi, tá ið tær eru samtyktar av Gøtu Fornminnisfelag og góðkendar av landsantikvarinum og Føroya Landsstýri. Tær broytingar, sum verða gjørdar í viðtøkunum skulu somuleiðis góðkennast av landsantikvarinum og Føroya Landsstýri.

Soleiðis samtykt á aðalfundi í Gøtu Fornminnisfelag tann 23. mars 1996.

Vátta: ............................ 16/10-1996

Frantz Jacobsen, formaður

..................................

Áslakkur Hansen, næstformaður